# Leitað verður eftir álopsspælarum



*Fleiri feløg leita eftir monnum, sum kunnu skjóta bóltin í málið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Illa sperdu feløgini eiga nú tvær vikur at rætta tað, sum tey hava hildið verið orsøkin til ússaligu gongdina og soltnu úrtøkuna í tveimum teimum fyrstu umførunum, og KÍ viðhaldsfólkini fara heilt víst at fjølgast, um teirra lið framvegis fer at fáa stóra úrtøku**

2. UMFAR SAMANUM
*Jóannes Hansen*

GÍ er einasta felagið, sum eftir tvey tey fyrstu umførini hevur fulla úrtøku. Tað er merkisvert, at GÍ framvegis eigur fyrsta stigamissin til góða. Bæði í steypakappingini og í landskappini.

Bara eitt felag hevur einki stig fingið í tveimum teimum fyrstu umførunum. Tað er B68. Sunnudagin vóru tað toppliðið og botnliðið, sum spældu á nýggja graslíkinum á Svangaskarði. Munurin var eyðsýndur soleiðis at skilja, at GÍ eigur eitt væl samanspælt fótbóltslið, sum bæði á verjupartinum og í álopspartinum hevur eina greiða fatan av, hvað tað gongur út uppá, og hvussu málið skal røkkast. So langt eru teir ikki komnir á Toftum, har teir stríðast við at seta nógv nýtt fólk í týdningarmiklar ódnir.

B68 hevur einki mál skotið, nú landskappingin er 180 minuttir gomul. Tað stendur heldur einki serliga til hjá HB og NSÍ. Bæði hava tey talst millum favoritt liðini. Nú hevur NSÍ eitt stig og málmunin 3–5, og HB hevur eitt stig og málmunin 1–3.

EB/Streymur eigur eisini til góða at skjóta fyrsta málið. Men hóast teir einki mál fingu á heimavølli ímóti HB, so mundi tað kennast sum meiri enn hálvur sigur, at teir í ein tíma megnaðu at halda tætt ímóti HB. At ellivu HB spælarar ikki megnaðu at gera av við tíggju heimamenn á Mølini, sigur nógv um støðuna í HB.

HB trupulleikin sæst eitt nú aftur í, at liðið higartil ikki hevur víst sannførandi avrik, og at spælið avgjørt ikki hevur borið brá av at vera av tí slagnum, sum HB ofta hevur diskað upp við, tá ið teir hava verið upp á tað besta, og sum teir ivaleyst meiri enn fegnir vilja vísa, nú teir skulu halda 100 ára dagin og stríðast fyri at seta FM met.

Í NSÍ og í B68 tykist tað sum um, at tað serliga er í málskjótingini, at tað stendur illa til. Í NSÍ hava teir roknað Helga L. Petersen og Gert Langgaard at vera miðvallarar. Teir siga seg nýta teir í fremstu røð, tí teir ongar rættuliga álopsspælarar eiga. B68 hevur einki mál skorað, og tað boðar ikki frá góðum.

Triðja umfarið í landskappingini er ikki á skránni fyrrenn annan sunnudag. Illa staddu feløgini arbeiða við at fáa styrkir aðra staðni frá, men tað er ikki altíð bara sum at siga tað. Í HB leingjast tey eftir Jákupi á Borg og Jan C. Dam, sum kanska fara at koma um ikki so langa tíð, og so Tór–Ingari Akselsen, sum sigst fara at síggjast aftur í HB eftir summarsteðgin, og so kanska onkrum øðrum.

Bæði í NSÍ og í B68 hava teir leitað uttanfyri eingjagarðarnar eftir álopsspælarum. NSÍ bjóðaði gamla B68 spælaranum Marcello Marcellino úr Brasilia og henda vegin at venja fyrr í ár, men álopsspælarin varð sendur til hús, tí hann var ikki nóg góður.

### Á kambinum

Burtursæð frá gøtumonnum eru tað Skála og KÍ og so ÍF, sum hava fingið bestu byrjanina. Vágbingar hava ikki tapt enn, men tað eigur ikki at vera nøktandi hjá VB ikki at fáa meiri enn eitt stig burturúr á heimavølli ímóti Skála. Sjálvt um heimavøllurin var á Tvøroyri, og sjálvt um Skála frammanundan á heimavølli hevði vunnið ímóti HB.

Fuglfirðingar vóru stak væl upplagdir seint seinnapartin sunnudagin. Eftir góða avrikið og einki stig í Gøtu, vóru teir grammir eftir at fáa úrtøku burturúr, og tað fingu teir væl og virðiliga ímóti NSÍ. Sigrar bera sjálvsálit við sær, og tað verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at hilnast hjá ÍF.

Skála eigur framvegis til góða at tapa í nýggju landskappingini. Undan ferðini um Suðuroyarfjørð varð sagt á Skála, at teir fóru at rokna eitt stig ímóti VB sum sera gott úrslit.

Í Klaksvík hava teir verið trilvandi og spyrjandi, hóast eingin hevur ivast í, at nýggi venjarin hevur gott tak á spælarunum og hevur megnað at birt uppundir annars stóra áhugan.

Kassameistarin hjá B36 mundi leggja til merkis, at tað vóru ikki so nógvir klaksvíkingar í Gundadali hesa ferð, sum tað plaga at vera, tá ið KÍ vitjar. Tað kann bera boð um, at KÍ viðhaldsfólkini framvegis ivast. Ivaleyst illneitaðust fleiri inn á seg sjálvi sunnudagin um, at tey ikki vóru farin um fjørðin. Um góða KÍ gongdin heldur fram, so kunnu kassameistarar í øðrum feløgum heilt víst fegnast um, at KÍ viðhaldsfólkini fara at fjølgast.

### Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | GÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 2 | B36 | 2 | 1 - 1 - 0 | 6 | 2 | 4 | 4 |
| 3 | Skála | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 1 | 2 | 4 |
| 4 | KÍ | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 5 | ÍF | 2 | 1 - 0 - 1 | 6 | 5 | 1 | 3 |
| 6 | VB | 2 | 0 - 2 - 0 | 1 | 1 | 0 | 2 |
| 7 | NSÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 5 | -2 | 1 |
| 8 | HB | 2 | 0 - 1 - 1 | 1 | 3 | -2 | 1 |
| 9 | EB/Streymur | 2 | 0 - 1 - 1 | 0 | 4 | -4 | 1 |
| 10 | B68 | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 3 | -3 | 0 |

### Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | FSV | 2 | 2 - 0 - 0 | 10 | 2 | 8 | 6 |
| 2 | TB | 2 | 2 - 0 - 0 | 8 | 3 | 5 | 6 |
| 3 | AB | 2 | 1 - 1 - 0 | 3 | 2 | 1 | 4 |
| 4 | VB | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 7 | -4 | 3 |
| 5 | Royn | 2 | 1 - 0 - 1 | 7 | 4 | 3 | 3 |
| 6 | B36 | 2 | 1 - 0 - 1 | 3 | 3 | 0 | 3 |
| 7 | B71 | 2 | 1 - 0 - 1 | 4 | 7 | -3 | 3 |
| 8 | KÍ | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 4 | -1 | 1 |
| 9 | Sumba | 2 | 0 - 0 - 2 | 2 | 4 | -2 | 0 |
| 10 | LÍF | 2 | 0 - 0 - 2 | 0 | 7 | -7 | |



B36–KÍ 2–2 (1–0):

# B36 trýsti ov ofta á koblingina

**Hóast teir tóktust vera á veg ímóti tapi, so megnaðu teir í KÍ at stríða seg so væl uppí aftur leikin í Gundadali, at tað síðsta løtuna rættuliga reið um snarið**

B36–KÍ
*Jóannes Hansen*



*Liðskiparin hjá KÍ, Atli Danielsen, í nærdysti við Ronnie Samuelsen hjá B36.*

*mynd: Álvur Haraldsen*

Tað var undirhald fyri allar pengarnar í Gundadali. KÍ vitjaði B36, og tað var intensitetur og spenningur.

Kring steðgin fór heimaliðið framum 2–0. Harvið bendi alt á heimasigur. Ikki minst tí B36 fyrstu lítlu løtuna av seinna umfarinum vísti nógv meiri hugflogsríkt spæl, enn teir høvdu gjørt í 1. hálvleiki. At John Petersen var komin á vøllin var serliga fyrstu løtuna góður styrkur í framrættaða spælinum.

Álopini skolaðu ímóti KÍ málinum. Santos og Jens Erik nýttu hæl og tá, og møguleikar spurdust burturúr. Tá ið sjey minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki, gjørdist miðvallarin Niels Joensen eftir innkast í høgru leysur dygst uttanvert brotsteigin. Hann royndi seg við fløtum skoti, hælurin á Niclasi Niclassen broytti kósina á bóltinum so mikið, at Jákup Mikkelsen var prísgivin, og so sá einki út hjá KÍ. B36 var frammanfyri 2–0 og í hopla.

So gloymdi B36 at taka uppgávuna í tí álvara, sum skal til. Santos og eisini onkrir aðrir høvdu hug at spæla og dusa sær. Áskoðararnir vóru við upp á tað, tá ið brasilski síðuspælarin fekk mótstøðumenn at mala so um seg sjálvar, at teir fóru á afturpartin. Men hetta var ikki effektivt, og tað gjørdist ikki betri av, at Santos var sera málfikseraður. Sum televarpið fyrstu tíðina frysti B36, og hóast teir av og á funnu stevið aftur, so var talan um dýrar støðgir.

### Stríddu og spældu

Fyri KÍ var tað køld pøs, tá ið Egil á Bø fimm minuttir undan hvíldini við perluskoti úr høgru og í handara síðunetið legði B36 framum. B36 – teir høvdu einki horna havt frammanundan – fekk trý horna eftir lítlari løtu. Í síðsta førinum kom bólturin til væl upplagda Bárð Mortansson, sum í vinstru tamdi – tað sá út sum um, at hann gjørdi tað við arminum, men tað helt dómarin ikki – og smekkaði til. Jákup Mikkelsen hálvbjargaði, og bólturin støkk út til Egil, sum skoraði vakra málið.

Frammanundan hevði KÍ havt bóltin meiri, og teir høvdu havt størsta møguleikan, tá ið Erling Fles úr eitt sindur spískum hevði stútað innlegg úr vinstru og til handara stólpan við síðuna av.

Merkisvert var tað, at KÍ hevði leikliga yvirvág stórar partar av fyrra umfarinum, sjálvt um B36 miðvøllurin var yvirmannaður. B36 hevði í útgangsstøðuna bara Áka Mørk á toppinum. Aftanfyri hann vóru fimm miðvallarar, sum skiftust um at bjóða seg fram at stuðla í fremstu røð. Hjá KÍ vóru fýra miðvallarar. Í álopinum vóru Erling Fles og Stig Edvin Aksnes, sum var lítið sannførandi undan steðginum, men eftir steðgin blomstraði eisini hann, og teir báðir syrgdu fyri tveimum málum.

Fýra minuttir eftir seinna B36 málið fingu klaksvíkingar nýggjan íblástur, og tá høvdu teir í løtum yvirvág á miðvøllinum, har Arnold Joensen, Atli Danielsen, Jan Joensen og Símun Joensen arbeiddu nógv og høvdu felags stev.

Dygst frá rangstøðumarkinum og eftir neyva framlegging frá Stig Edvin Aksnes slapp Erling Fles frá ikki serliga sannførandi – burtursæð frá Póli Thorsteinsson – B36 verjuni, og hann setti trygt framvið Trónda Vatnhamar. Fýra minuttir seinni var aftur galið hjá B36. Í vinstra borði og frammanfyri miðstrikuna vunnu klaksvíkingar bóltin, næstan frá baklinjuni smekkaði Stig Edvin Aksnes innfyri, og Erling Fles var fyrstur á.

B36 royndi onkra løtuna at trýsta. Bárður Mortansson slapp onkra ferðina frá Marek og til baklinjuna og legði innfyri, men Aleksander Djordjevic og Niclas Niclasen lósu spælið væl. Jens Erik Rasmussen slapp eina ferð púra leysur ímóti Jákupi Mikkelsen, sum bjargaði. Í hinum endanum vildu klaksvíkingar hava, at bólturin hevði verið innanfyri, áðrenn B36 verjan eftir horna ruddaði burtur, men tað mettu dómari og linjuverji ikki.

**B36–KÍ 2–2 (1–0)**
1–0: Egil á Bø 39.
2–0: Niels Joensen 52.
2–1: Erling Fles 55.
2–2: Erling Fles 61.
**Dómari:** Suni Johansen
**B36:** Tróndur Vatnhamar – Arnbjørn Daniesen, Egil á Bø, Pól Thorsteinsson, Sverrir Kjærbo – Niels Joensen, Ronnie Samuelsen (John Petersen, 46.), Bárður Mortansson, Jens Erik Rasmussen, Alex Santos – Áki Mørk
**Gult kort:** John Petersen
**KÍ:** Jákup Mikkelsen – Leon Bjartalíð (Jan Andreasen, 60.), Niclas Niclasen, Aleksander Djordjevic, Marek Vierbiczki – Arnold Joensen, Jan Joensen, Atli Danielsen, Símun Joensen – Erling Fles, Stig Edvin Aksnes
**Gult kort:** Marek Vierbiczki, Atli Danielsen, Jan Joensen, Jan Andreasen

## Kapping styrkir um

KÍ liðformaðurin Atli Danielsen taldist millum teir mest eyðsýndu. Hann stríddist og var sannførandi bæði í verju– og álopspartinum. Nú hava klaksvíkingar eyguni vendum ímóti fjórðingsfinaluni í steypakappingini, sum teir skulu spæla í Fuglafirði leygardagin. Atli roknar við sera torførari uppgerð, men hann heldur samstundis, at javnleikurin í Gundadali vísti, at tað gongur rætta vegin.

– Vit eru væl nøgdir. Eg haldi, at vit løgdu væl fyri í 1. hálvleiki, men í 2. hálvleiki vóru vit ikki væl við fyrstu løtuna. Tá ið teir vóru komnir framum við tveimum málum, sá tað ikki so væl út. Tíbetur skoraðu vit skjótt til 2–1, og tá fingu vit orduliga um endan. Síðstu løtuna kundi tað fara báðar vegir, og vit kunnu væl liva við 2–2.

Serliga fegnan sigur Atli seg vera um, at álopsspælararnir stóðu seg so væl í 2. hálvleiki.

– Tað hevur verið kapping um plássini aftari á vøllinum. Vit roknaðu tað fyri dyggan smeit, tá ið álopsspælarin Jacob Bymar varð skaddur. Sunnudagin sóu vit, at hann skal stríðast fyri at sleppa innaftur, og tað er positivt.

## Áttu at havt bundið um

B36 liðformaðurin Pól Thorsteinsson hevur ikki so nógv at finnast at javnleikinum. Hann er samdur við starvsfelaganum í KÍ um, at síðstu løtuna kundi tað fara báðar vegir. Men Pól Thorsteinsson iðrar seg um, at teir ikki megnaðu at varðveiðta leiðsluna, tá ið teir vóru komnir framum við tveimum málum.

– Talan er um heppið mál, tá ið bólturin broytir kós og snýtir Jákup Mikkelsen. Men tað telur eisini, og tá ið við vóru á odda 2–0, áttu vit at havt bundið um í verjupartinum. Klaksvíkingar stríðast meiri tá, teir fáa skjótt eitt mál, og so var púra opið aftur, sigur Pól Thorsteinsson.

Eftir steðgin kom Ronnie Samuelsen ikki á vøllin aftur. Pól Thorsteinsson veit at siga, at tað var neyðugt at taka John Petersen inn, tí Ronnie var so mikið skaddur, at hann illa fekk spælt.

B36-TB 1-2 (0-1):

## Sigursmál kom í seinastu løtu

Tvøramenn hava fingið fulla úrtøku, nú tvey umfør eru farin av landskappingini í 2. deild. Í fyrsta umfari vann TB ein sannførandi 6-2 sigur á B71 á Sevmýri, men leygardagin stóð nógv á, tá ið aldursforestin í føroyskum ítrótti var á vitjan hjá B36 í Gundadali.

Gestirnir fingu eisini bestu byrjanina upp á dystin, og teir løgdu seg á odda í fyrra halvleiki við einum máli, sum Hallur Christiansen skeyt. Hendan støðan helt sær eisini leingi, men so hvørt sum dysturin leið, gjørdist heimaliðið eisini vandamiklari. Hetta gav úrslit stutt fyri tíð, tá ið tað eydnaðist Halgir Arge at javna fyri B36. Gleðin var tó stokkut, tí í seinastu løtu eydnaðist tað tvøramonnum at bjarga sær øll trý stigini, tá ið Bárður Dimon skoraði sigursmálið til 2-1. Við sigrinumhevur TB nú seks fyri tveir dystir, og liggja teir ájavnt við vágamenn í oddinum av næstbestu fótbóltsdeildini. Havast skal eisini í huga, at landsliðsskiparin Óli



Johannsen enn ikki er tøkur hjá TB, men tá ið hann verður við aftur um fáar vikur, verður liðið óivað eitt vet sterkari, so tað sær ikki so galið út hjá tvøramonnum.
*tn*

**B36-TB 1-2 (0-1)**
0-1 Hallur Christiansen
1-1 Halgir Arge
1-2 Bárður Dimon